UTTAN ÚR HEIMI

# Russiski herflotin í ringum standi

**Óhappið við tí lítla kavbátinum í Kyrrahavinum avdúkaði, at russiski herflotin er bæði slitin og illa røktur**

RUSSLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*
*Mynd: Reuters*



*Uttan vesturlendska hjálp hevði tað neyvan borið til at bjarga manningini á russiska kavbátinum*

Tey sjey menninir í tí lítla russiska kavbátinum AS-28 vóru ovurfegnir, tá teir komu í land av einum av bjargingarskipunum.

– Vit vistu, at vit fóru at verða bjargaðir, segði Vjatsjeslav Milasjevskij, kavbátaskipari, tá hann var komin í land. Men uttan hjálp frá øðrum høvdu hann og hinir neyvan verið bjargaðir.

– Eg kann bara takka okkara bretsku starvsbrøðrum fyri hjálpina, segði admiralurin Vladimir Pepelijev við AP og sipaði til, at tað var ein fjarstýrt bretskt far, sum loysti tann russiska kavbátin, so hann kundi fara upp av botni, har hann hevði sitið fastur síðani hósdagin.

### Illa hildin

Í altjóða eygum verður bjargingin mett sum ein sigur fyri viðurskiftini ímillum Russland og NATO, men í russisku herflotaleiðsluni er uppfatanin ein onnur. Har halda fleiri, at tilburðurin var ein vanærisligur smeitur fyri Russland. Eitt nú helt admiralurin Eduard Baltin lítið um, at stjórnin hevði sent boð eftir amerikanarum, bretum og japanum.

Tey seinastu árini hava fleiri dømi verið um, at tann russiski herflotin er illa fyri. Tey flestu skipini eru gomul, og lítið verður gjørt við at halda tey við líka. Tað kom týðiliga til sjóndar, tá kavbáturin Kursk sakk í Barentshavinum í august í 2000. Kanningar avdúkaðu, at hann var sokkin, tí ein torpedo var brostin. Vanlukkan kravdi 118 mannalív.

Fyri tveimum árum síðani sakk kavbáturin K-159, meðan eitt skip var í ferð við at toga hann til lands, tí hann skuldi leggjast. Níggju av teimum tíggju monnunum, sum vóru við kavbátinum, druknaðu.

# Robin Cook deyður

DEYÐAFALL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Robin Cook hevði sjáldsamar gávur, sigur bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, um gamla uttanríkisráðharran. Teir vóru minni enn so samdir í øllum.

Fyrrverandi bretski uttanríkisráðharrin Robin Cook doyði um vikuskiftið. Hann small, meðan hann var á gonguferð í skotska hálendinum saman við konuni. Hann var 59 ára gamal.

Robin Cook varð fyrstu ferð valdur í Undirhúsið í 1974, og hann var uttanríkisráðharri frá 1997 til 2001. Hann var ein íðin talsmaður fyri, at NATO skuldi leggja upp í borgarakríggið í Kosovo fyri at gera enda á serbiska ágangin har. Harafturímóti var hann harðliga ímóti avgerðini hjá Tony Blair at fara í kríggj við Irak, og tí gjørdi hann av at fara frá sum formaður í tingbólkinum hjá arbeiðaraflokkinum fyri tveimum árum síðani.

– Sum uttanríkisráðharri var Robin Cook nógv avhildin, og hann hevði stóra ávirkan á ráðharraráðið hjá ES. Hann dugdi væl at leggja síni sjónarmið fram og at grundgeva fyri sínum áskoðanum, men hann dugdi eisini væl at samansjóða prinsipp og tað rímiliga, sigur Javier Solana, sum hevur ábyrgdina av uttanríkispolitikkinum hjá ES.

## Fjala myndir og skjøl

Amerikanska stjórnarumsitingin hevur ongantíð fjalt so nógv skjøl sum nú, skrivar DPA. Tað verður gjørt við at stempla skjølini sum loynilig, og sambært amerikonskum fjølmiðlum fáa 125 skjøl hetta stemplið hvønn einasta minutt alt samdøgrið.

Verjumálaráðið í Washington sýtti eisini amerikonsku fjølmiðlunum at vísa myndir av kistum við deyðum hermonnum úr Irak. Tað fekk ein løgfrøðiprofessara í statinum Delaware at fara í rættin við verjumálaráðnum. Hann vildi vera við, at lógin heimilar ikki myndugleikunum at seta slíkt bann, og rætturin gav honum viðhald.

Sambært DPA hevur eingin amerikonsk stjórn valt at fjala so nógv skjøl sum stjórnin hjá George W. Bush, forseta. Í fjør vórðu 15,6 milliónir skjøl stemplað sum loynilig eftir áheitan frá stjórnini. Tað er met og samstundis tvær ferðir so nógv sum í yvirgangsárinum 2001.

Borgararættindafelagsskapir og demokratiskir politikarar hava funnist at framferðini hjá stjórnini, og fleiri republikanskir floksfelagar hjá Bush halda eisini, at stjórnin er vorðin ov hulin, skrivar DPA.

## Prestatrot

Tað gongst illa hjá teirri katólsku kirkjuni í Evropa at útvega sær nóg mikið av prestum, skrivar norska blaðið Vårt Land.

Sambært blaðnum er tað bara kirkjan í Pólandi, sum hevur nóg mikið av prestum, og har er áhugin at læra til prest eisini rímiliga stórur. Í øðrum londum er áhugin minkaður nógv, og summastaðni er stórt trot á prestum. Harafturímóti hevur tann katólska kirkjan aðrastaðni í heiminum als ongar trupulleikar við at fáa nóg mikið av prestum. Tvørturímóti er talið á prestaskúlum har tvífaldað tey seinnu árini.

Prestatrotið í Evropa hevur havt vi sær, at nógva staðni hava kirkjurnar verið noyddar at fáa sær polskar prestar, og tað hevur gjørt, at umleið ein fjórðingur av teimum katólsku prestunum í Evropa eru pólendingar.

Tað er kortini ikki bara tann katólska kirkjan, sum hevur ov fáar prestar. Tað sama er galdandi innan protestantisku kirkjuna í Bretlandi og Týsklandi, skrivar Vårt Land.

## Dómarar hava tíðindafund

Svenska dómsvaldið umhugsar at skipa so fyri, at dómarar, sum fella ein umstríddan dóm, skulu kunngera tíðindaskriv ella skipa fyri tíðindafundi, so teir kunnu greiða frá grundgevingini fyri dóminum.

Orsøkin er, at í seinastuni hava fleiri svenskir dómarar fingið hóttanarbrøv, tí fólk hava verið misnøgd við teirra avgerðir. Tann seinasti tilburðurin var herfyri, tá ein dómari skarvaði av samsýningini, sum ein ung genta hevði fingið, eftir at hon hevði sæð ein mann neyðtaka og myrða mammu hennara. Avgerðin hjá dómaranum fekk øði í nógvar sviar, og dómarin bleiv hóttur eftir lívinum.

Ein kanning hjá Svenska Dagbladet vísir, at tólv prosent av teimum svensku dómarunum hava verið fyri ágangi, eftir at teir hava felt dómar, sum fólk hava verið misnøgd við. Tí heldur dómsvaldið, at dómararnir skulu fáa høvi at greiða frá sínum avgerðum við tíðindaskrivum ella tíðindafundum.

## Posturin feldi stjórnina

Japanska stjórnin kom í minniluta í tjóðartinginum í gjár, tá tingið atkvøddi um eitt uppskot hjá stjórnini um at nútímansgera postverkið.

Uppskotið hjá stjórnini fekk 108 atkvøður, men tað var ov lítið, tí 125 tinglimir atkvøddu ímóti tí.

Tað fekk Junichito Koizumi, forsætisráðharra at boða frá, at hann fer at skriva út nýval til tjóðartingið.